# MENNINGARÆTLAN FYRI FERÐAVINNUNA Í KIRKJUBØ 2019



TÓRSHAVNAR KOMMUNA
OG VISIT TÓRSHAVN
MAI 2019

Útgevari: Tórshavnar kommuna og Visit Tórshavn
Útgivið: Mai 2019
Myndir: Ólavur Frederiksen (Faroephoto.com)
Ráðgeving: Annika W. Joensen (Ráðstovan Kveiki)
Málslig ráðgeving: Emil Lisberg Jacobsen
Uppseting og snið: Henning Hjalt Nicodemussen (NiNG)
Talgild útgáva kann takast niður á heimasíðuni hjá Tórshavnar kommunu

# SAMANDRÁTTUR

Hendan menningarætlan er eitt stig á leiðini at skipa og menna ferðavinnuna í Kirkjubø.

Uppskotið fevnir um tilmælir og ítøkilig átøk, sum eru grundað á støðulýsingar og samskifti við myndugleikar, stovnar og onnur, ið varða av ella hava áhuga fyri ferðavinnuni í Kirkjubø, og á ymiskar ætlanir og frágreiðingar um ferðavinnu.

Eisini er lagt upp fyri teimum rákum, ið gera seg galdandi innan ferðavinnuna, hagtølum, spurnarkanningum og øðrum. Menningarætlanin leggur seg eftir teimum tilráðingum, sum eru nevndar í heildarætlanini hjá Uttanríkis- og Vinnumálaráðnum og í ferðavinnupolitikkinum fyri Tórshavnar kommunu.

Nøkur av tilmælunum snúgva seg um stór og heldur torgreidd mál, ið skulu kannast nærri av fakkønum og sum krevja munandi fígging.

Í tilgongdini hevur dentur verið lagdur á at finna fram longu framleitt tilfar um ferðavinnu í Kirkjubø. Og at vitja í Kirkjubø og hitta bygdarfólkið á máli. Eisini hevur verið túrur eftir varðagøtuni úr Havnardali til Kirkjubøar við ferðaleiðara og runt í bygdini við frásøgufólki frá Tjóðsavninum.

Fyri at hava eina burðardygga og ábyrgdarfulla ferðavinnu, er tað sera týdningarmikið at hava fólkið á staðnum við. Tey hava nógv at siga fyri, at ferðavinnan skal roynast væl á staðnum. Tí er dentur lagdur á, at fólk í bygdini hava havt møguleika at siga sína hugsan.

Støðulýsingin visir, at tað er neyðugt at gera nakrar broytingar, so ferðafólk skulu fáa eina góða uppliving, tá ið tey vitja í Kirkjubø, men líka týdningarmikið er tað, at ferðavinnan ikki slítur uppá fornminnini og náttúruna, og at bygdafólk kunnu kenna seg væl í síni egnu heimbygd.

Fornminnini í Kirkjubø eru ikki nóg sjónlig og miðlingin av søguni um hesi fornminni kann gerast betri, soleiðis at hon fylgir teimum rákum, ið eru í ferðavinnuni.

Eisini má skeltast og kunnast betur soleiðis, at fólk ikki eru til ampa fyri bygdafólk og náttúruna. Harafturat er neyðugt at gera gøtur í bygdini fyri at leiða ferðafólkini tann rætta vegin.

Viðvíkjandi ferðslu er neyðugt at dagføra vegin, so hann hóskar seg til ta mongdina av ferðslu, ið er og kann væntast í framtíðini.
Ferðavinnan í Kirkjubø hevur møguleika fyri at fáa fleiri inntøkur, og her eiga átøk at verða gjørd fyri at arbeiða fram ímóti hesum.

Vitanin um ferðafólkini er lítil og tí er neyðugt at fáa hagtøl til vega soleiðis, at greitt verður, hvussu nógv ferðafólk vitja í Kirkjubø, og hvørji tey eru.

# INNGANGUR

Í 2017 legði Uttanríkis- og Vinnumálaráðið fram heildarætlan fyri ferðavinnuna, sum vísir politiska viljan at menna eina ábyrgdarfulla ferðavinnu við búskaparligum vinningi fyri eyga.

Fýra ár frammanundan, í 2013, legði Visit Faroe Islands eina nýggja strategi fram, sum segði, at ferðavinnan í 2020 skuldi røkka 1 mia. kr. í umsetningi og 200.000 gistingum.

Sambært frágreiðingini vísir tað seg, at settu málini frá 2013 eru rokkin, og nú eru nýggj mál sett. Millum annað eru ynski um at røkka einum umsetningi á 1,5 mia. í 2025.

Síðani 2013 hevur verið nógv fokus á ferðavinnuna. Marknaðarføringin hevur sett Føroyar á heimskortið. Eisini hevur ferðavinnan verið eitt stórt samrøðuevni millum føroyingar. Spurningar hava tikið seg upp um, hvussu vit kunnu reka ferðavinnu, og um hvussu vit kunnu verja okkara náttúru og mentan.

Hetta eru viðurskifti, ið eru sera týdningarmikil at taka støðu til, og nú tá ið ferðavinnan økist í hvørjum, so er eisini neyðugt, at vit eru fyrivarin til tess at fáa eina burðardygga ferðavinnu.

Øktu ferðafólkavitjanirnar – føroyingar og útlendingar – til Kirkjubøar seinnu árini hava víst, at tað er neyðugt at skipa undirstøðukervið til øktu ferðsluna í Kirkjubø, og skipa fyri betri møguleikum at fáa okkurt til matna og at fáa upplivingar. Eisini eru tekin um, at náttúran er farin at slítast og at bygdarlívið til tíðir órógvast óneyðuga.

Um Kirkjubø er at siga, at bygdin er ein av elstu bygdum í Føroyum við leivdum heilt aftur í 10. øld. Fornfrøðiliga og søguliga er bygdin ein dýrgripur. Onga aðrastaðni í Føroyum eru so stórfingin fornminni.

Bygdin er hugtakandi við vøkrum landslagi, sínum serstaka byggistíli og eini sera áhugaverdari søgu um millum annað biskupssetrið, ið var har í miðøldini. Millum annað hetta og tað, at Kirkjubøur liggur so nær við høvuðstaðin, ger, at bygdin er eitt av mest vitjaðu ferðamálum í Føroyum.



# DAGSINS FERÐAFÓLK

Niðurstøðan av ferðafólkakanningini, ið Gallup gjørdi í Føroyum í 2017, var, at ferðafólkini, ið koma til Føroya, eru væl upplýst og búgvin fólk, ið ferðast saman við makanum. Tey hava í stóran mun hægri útbúgving, hægri inntøku enn miðal og velja øðrvísi ferðamál enn onnur.

48% av teimum, ið vitja Føroyar um summarið, eru norðurlendingar. Hetta er áhugavert fyri Kirkjubø, tá ið tað vísir seg at vera serliga norðurlendingar, ið hava áhuga fyri søguni og fornminnunum í Kirkjubø. Viðvíkjandi talgildari kunning søgdu 67% seg nýta snildfon ella teldil til at søkja sær vitan. Hetta var í 2017, og talið er óivað støðugt vaksandi.

54% av ferðafólkunum, ið vitja Føroyar, ynskja at hava samband við føroyingar. Hetta samsvarar væl við eitt rák innan altjóða ferðavinnu, sum Wonderful Copenhagen nevnir Localhood. Sambært teimum er ferðavinnan á veg inn í eitt nýtt tíðarskeið, har ið sambandið millum fólkið á staðnum og ferðafólkið er tað avgerandi. Ferðafólk í dag vilja ikki eyðmerkjast sum ferðafólk, men heldur sum gestir, ella sum fyribils íbúgvar. Nýggj ættarlið av ferðafólkum vilja uppliva tað sanna lívið og merkja, at tey eru ein partur av samfelagnum har tey vitja. Hetta skal gerast á ein hátt, so at tað bæði er til gleði fyri gestin og íbúgvarnar. Málið er, at íbúgvarnir eru ernir av teirra heimstaði og ynskja at bjóða øðrum á vitjan.

Í Kirkjubø er torført hjá bygdarfólki og ferðafólki at hittast, tí tey allarflestu bygdarfólkini reka ikki vinnuvirksemi innan ferðavinnuna, og her er einki stað har tey kunnu hittast, sum t.d. ein kaffistova ella sølubúð.

Kanning, ið Gallup gjørdi í 2018, vísti at 42,2% av ferðafólkunum vitjaðu í Kirkjubø.

## ENDAMÁLIÐ

Endamálið við hesi menningarætlan er við støði í ferðavinnupolitikkinum hjá Tórshavnar kommunu at lýsa støðuna hjá ferðavinnuni í Kirkjubø í dag, og at lýsa hvørjir møguleikar eru fyri at menna og samskipa ferðavinnuna soleiðis, at vit taka væl ímóti ferðafólkunum.

Tað er týdningarmikið at taka hond um hetta soleiðis, at bæði borgarar og ferðafólk kunnu njóta hesa vøkru bygd. Ferðavinnan skal skapa møguleikar fyri menning og vera til minst møguligan ampa fyri náttúru og gerandislívið í Kirkjubø.

Tað er neyðugt at gera nakrar broytingar fyri, at ferðafólkini skulu fáa eina betri uppliving í Kirkjubø, men eins týdningarmikið er tað, at ferðavinnan er burðardygg.

Uttanríkis- og Vinnumálaráðið orðaði í 2017 eina heildarætlan fyri ferðavinnuna í Føroyum. Ein av høvuðsniðurstøðunum var, at vit eiga at arbeiða eftir meginreglunum um burðardygga ferðavinnu.

Hetta merkir, at ferðavinnan:
- skal skipast soleiðis, at umhvørvið ikki verður dálkað, og at náttúran verður varðveitt.
- skal ikki gera seg inn á bygdarlívið og sosialar skipanir.
- skal kasta av sær og geva lokala umhvørvinum búskaparligan ágóða.

Í hesi ætlan verður eisini miðað eftir at fylgja hesum meginreglum.

Menningarætlanin skal veita eitt yvirlit yvir, hvørji átøk ymiskir ábyrgdarar kunnu fara í holt við fyri at betra um umstøðurnar soleiðis, at ferðavinnan í Kirkjubø kann skipast betur.

## TILGONGDIN

Í sambandi við hesa menningarverkætlan hevur verið vitjað í Kirkjubø og tosað við bygdarfólkið.

Túrur er gjørdur eftir varðagøtuni úr Havnardali til Kirkjubøar við ferðaleiðara og runt í bygdini við frásøgufólki frá Tjóðsavninum og eisini hevur verið ein ferðavinnufundur, har fólk í Kirkjubø vóru boðin at siga sína hugsan.

Tosað hevur verið við Tjóðsavnið um, hvørjar verkætlanir eru í gongd og um hvørjar avbjóðingar og møguleikar tey síggja.

Harumframt hava ferðavinnusmiðir og fólk frá menningardeildini hjá Visit Faroe Islands sagt sína hugsan um Kirkjubø sum ferðavinnubygd.

Fyri at kunna lýsa støðuna við, hvat tilfar er gjørt og hvørji átøk eru sett í verk, hevur samskifti verið við Landsverk, staðbundnu nevndina fyri Kirkjubø og deildir hjá Tórshavnar kommunu.

## ÁBYRGDARAR

Menning av ferðavinnuni krevur samskipan og samstarv frá fleiri myndugleikum, stovnum, fyritøkum v.m.

Tórshavnar kommuna hevur ábyrgdina av at skelta soleiðis, at ferðafólkini ikki eru til ampa fyri bygdarfólkið og náttúruna í bygdini, og at syrgja fyri, at gøtur, parkeringsviðurskifti, vesi, hentleikar o.a. eru í lagi.

Tá ið tað ræður um fornminni hevur Tjóðsavnið, sum er undir Mentamálaráðnum, ábyrgdina av at verja fornminnini og at miðla søguna um tey. Náttúrufriðingarnevndin er partur av málinum eisini.

Landsverk eigur innkomuvegin til bygdina og eigur tí ábyrgdina av at skipa ferðslu, skelting v.m. á landsvegnum og at dagføra vegakervið.

Umframt at standa fyri gerð av menningarætlanum so sum hesari, hevur Visit Tórshavn ábyrgdina av at veita kunning og syrgja fyri at miðla kunningina á ein hátt, ið ger tað lætt og áhugavert hjá ferðafólki at vitja í Kirkjubø. Eisini hevur Visit Tórshavn ábyrgdina av at fáa til vega vitan um ferðafólkini við t.d. at gera kanningar. Harafturat er ein uppgáva at eggja og stuðla til skapan av upplivingum og yvirhøvur at virka fyri, at bygdin mennist í mun til ferðavinnu.

## AVMARKING

Á nøkrum økjum ber til at nágreina, hvørji átøk skulu setast í verk, og hvussu langa tíð hesi taka. Á øðrum økjum, sum t.d. viðvíkjandi ferðslu á landsvegnum og fornminnunum, snýr tað seg um heldur torgreidd mál, ið skulu kannast nærri av fakkønum fólki og krevja munandi fígging.

Tí eru nøkur av átøkunum ítøkilig, meðan onnur eru meira yvirskipaði og krevja, at fólk við fakkunnleika finna tær røttu loysnirnar.

Fyri at fáa eina heildarmynd av støðuni við ferðavinnuni í Kirkjubø, eru samrøður gjørdar við fólk úr ferðavinnuni, bygdarfólk, Landsverk, Tjóðsavnið o.a.. Eisini er vitan fingin til vega frá kanningum og øðrum tilfari um ferðavinnuna. Út frá hesum eru tilmæli og uppskot um átøk gjørd.

Fleiri av hesum tilmælum og átøkum krevja eina nærri kanning, har støða verður tikin til ábyrgdara og/ella myndugleika, fakkunnleika, tíðarbil, kostnaðarmetingar o.a.

# ÁTØK, KOSTNAÐAR- OG TÍÐARÆTLAN

| | Síða: | Ábyrgd: | 2019: | 2020: |
|---|---|---|---|---|
| **1. ÁTØK UM AT SIGA TÆR GÓÐU SØGURNAR OG VEITA KUNNING** | | | | |
| At betra um miðlingina | 10 - 11 | VT | 25.000 kr. | |
| At gera eitt kort, ið bæði gevur yvirlit yvir fornminnini, hentleikar, útsýnisstøð, gøtur o.a. | 12 - 13 | VT | | 150.000 kr. |
| At dagføra og gera fleiri útsýnispostar við beinkjum, skeltum v.m. | 12 - 13 | VT | 50.000 kr. | 50 000 kr. |
| At dagføra og økja um talgildu kunningina, bæði á leitiportalum og á heimasíðum | 14 - 15 | VT | VJ | |
| At seta ljós á fornminnini | 14 - 15 | | | EM |
| At framleiða skelti ella veita annað slag av kunning, um hvussu tú ferðast í Kirkjubø | 16 - 17 | VT | | 120.000 kr. |
| **2. ÁTØK UM AT BØTA UM VINNU-OG INNTØKUMØGULEIKAR** | | | | |
| At gera eina lýsing av, hvørji ferðavinnurekandi koma til Kirkjubøar | 18 - 19 | VT | VJ | VJ |
| At skipa fyri kveikingartiltøkum, fyri íbúgvum í Kirkjubø | 18 - 19 | VT og Hugskotið | 5.000 kr. | 10.000 kr. |
| At finna eitt brand fyri Kirkjubø | 20 - 21 | VT | | 50.000 kr. |
| At kanna hvussu gjald kann takast fyri at vitja fornminnini | 20 - 21 | VT, TS og festið | VJ | |
| **3. ÁTØK UM AT SKIPA FERÐSLUNA BETUR** | | | | |
| At heita á myndugleikarnar um at raðfesta dagføring av Kirkjubøarvegnum | 22 - 23 | TK | VJ | |
| Inntil vegurin verður dagførdur, at seta seg í samband við ferðavinnusmiðir um at samskipa bussferðsluna betri | 22 - 23 | VT | VJ | |
| At skipa og fríðka økið á keiini og gera reglur fyri parkering | 24 - 25 | TK | | 400.000 kr. |
| At dagføra bátadráttin | 24 - 25 | TH | 200.000 kr. | |
| At finna eina gjaldsskipan til býarbussin og at gera eina betur skilliga ferðaætlan fyri ferðafólk | 24 - 25 | TK | VJ | |
| **4. ÁTØK UM AT VERJA FORNMINNINI OG BØTA UM ØKINI RUNDANUM** | | | | |
| At gera bakka- og brimverju | 26 - 27 | MMR | 1.000.000 kr. | EM |
| At gera gøtur til fornminnini | 26 - 27 | | EM | EM |
| **5. ÁTØK UM AT FREMJA ÁBØTUR Á VARÐAGØTUNA TIL HAVNAR** | | | | |
| At bøta varðagøtuna til Havnar og eyðmerkja vitjunarverd støð á leiðini | 28 - 29 | VT, TK, BST,BS, VFI, festibøndur og NFM | | 1.100.000 kr. |
| **6. ÁTØK UM AT FÁA TIL VEGA VITAN UM FERÐAFÓLKINI** | | | | |
| At seta ferðsluteljara upp í Kirkjubø og ein teljara, ið kann telja fólk til gongu | 30 - 31 | TK og LV | EM | EM |
| At innsavna vitan um ferðafólkini | 30 - 31 | VT | | 75.000 kr. |

*Styttingar fyri nøvn: VT=Visit Tórshavn, TK=Tórshavnar kommuna, TS=Tjóðsavnið, LV=Landsverk, MMR=Mentamálaráðið, BST=Búnaðarstovan, NFM=Náttúrufriðingarmyndugleikarnir, TH=Tórshavnar havn*
*Aðrar styttingar: VJ=Verandi játtan EM=Eingin Meting*

1. AT SIGA TÆR GÓÐU SØGURNAR OG VEITA KUNNING

# SØGUR UM KIRKJUBØ

Á Tripadvisor og Google hava ferðafólk ummælt vitjanina í Kirkjubø. Nógvar jaligar viðmerkingar eru, men tó eru eisini nøkur, ið halda at vitjanin ikki er so áhugaverd.

T.d. sigur ein ummælari á Tripadvisor "Søgan og týdningurin av múrinum eru nógv meira áhugaverd enn tað, ið er at síggja ..."

Hetta bendir á, at okkurt meira kundi verið gjørt fyri at gera vitjanina meira áhugaverda.

Tjóðsavnið hevur gjørt ein bókling um fornminnini í Kirkjubø. Eisini hevur Tjóðsavnið gjørt ein faldara, ið ferðafólk kunnu fáa sær, tá ið tey koma til Kirkjubø. Hesin vísir eitt yvirlit yvir tey fornminni, ið eru í økinum við kirkjuna og múrin, og gevur eisini stutta lýsing av biskupssætinum og Kirkjubøstólunum.

Storytelling er eitt fyribrigdi, ið er sera nógv brúkt innan ferðavinnuna. Tað er trupult at fanga ferðafólkini, um tey bert síggja ein bygning og eitt árstal. Men um tey hoyra um tær áhugaverdu og spennandi hendingarnar, ið fóru fram á staðnum, kanska júst á tí blettinum, ið tey nú standa á, kunnu tey liva seg inn í hendingarnar, og tí fáa tey eina betri uppliving.

Magnus-Katedralurin (múrurin), Ólavskirkjan (kirkjan) og Roykstovan eru tey fornminni, ið fólk kenna best. Hetta eru eisini trý sera týdningarmikil fornminni við eini áhugaverdari søgu, men tó so eru eisini fleiri onnur støð í bygdini, ið kundu fingið meira umtalu.

Nevnast kunnu: Líkhús, Sverrishola, Sankta Brandans vík, Húsini hjá Erlendi Patursson, Steinasavnið hjá Tjóðsavninum, Toftirnar í Hólminum o.s.fr..

Nógvar áhugaverdar søgur eru eisini at siga um kend bygdarfólk. Her hava búð m.a. Erlendur bispur, ið skrivaði Seyðabrævið og stóð fyri at byggja Magnusarkatedralin, Sverri kongur, ið gekk á prestaskúla í bygdini og seinni bleiv Noregs kongur, og Gæsa, sum sigst hava etið kjøt í føstu og tí misti Kirkjubøgarð, ið bleiv lagdur inn undir kirkjuna.

Eisini frá nýggjari tíð kunnu nevnast Jóannes Patursson, bóndi og politikkari, ið stovnaði Sjálvstýrisflokkin, íslendska kona hansara Guðný, ið stovnaði húsarhaldsskúla í Kirkjubø, Súsanna Helena Patursson, ið var rithøvundur og var undangongukvinna í bókmentasøgu, blaðsøgu og kvinnustríðnum, og listamaðurin Tróndur Patursson.

At fáa nakað at vita um hesar søgur og hesi fólk kann bæði vera til gagns fyri ferðafólk, ið kunnu fáa meira vitan um Kirkjubø, men eisini kann hetta vera til gagns fyri bygdarfólk og alt Føroya fólk, ið fær eina breiðari vitan um Kirkjubø.



*"Múrurin er verdur at vitja, ikki tí at tað er nógv at síggja inni í múrinum, men tí hann stendur á einum vøkrum stað" (Ummæli frá Tripadvisor)*

*"Søgan og týdningurin av múrinum er nógv meira áhugaverdur enn tað, ið er at síggja ..." (Ummæli frá Tripadvisor)*

***ÁTAK: Visit Tórshavn og Tjóðsavnið eiga at betra um miðlingina viðvíkjandi forminnunum og søgunum um bygdina.***




1. AT SIGA TÆR GÓÐU SØGURNAR OG VEITA KUNNING

# KORT YVIR FORNMINNI, HENTLEIKAR, VEGLEIÐINGAR O.A.

Hóast tann talgilda kunningin verður meira og meira brúkt, so eru enn nógv ferðafólk, ið dáma væl at hava okkurt ítøkiligt í hondini, ið kann geva teimum eitt yvirlit, og tí er tað ein góð tænasta at hava eitt kort at bjóða ferðafólki.

Eitt av málunum í ferðavinnupolitikkinum hjá Tórshavnar kommunu er at fáa til vega eitt býarkort, ið vísir eitt yvirlit yvir vitjunarverd støð, gøtur o.a.. Sum fyrr nevnt hevur Tjóðsavnið gjørt ein faldara yvir fornminnini, ið eru við kirkjuna og múrin. Tó gevur hetta kortið ikki eitt samlað yvirlit yvir alla bygdina.

Ein avbjóðing í Kirkjubø er, at fólk ganga í bønum og klintra upp um stik og koma inn á privata ogn. Hetta kundi verið forðað við at gjørt eitt kort yvir alla bygdina, har tað var greitt, hvar fólk kunnu ganga og hvussu tey eiga at bera seg at. Á kortinum ber til at vísa á eina leið, sum ferðafólkini kunnu ganga. Á leiðini skulu vera benkur og útsýnispostar og skeltir.

Nakað, ið er við til at virðisøkja ein ferðavinnustað og er við til at veita gestunum eitt tilknýti til staðið, er at veita kunning um lívið í bygdini, t.d. hvussu nógv fólk búgva her, at tey flestøll eru í ætt, hví øll húsini eru svørt við flagtekju, og um hví flagtekjan verður brúkt í Føroyum.

Kanningar vísa, at størsti parturin av ferðafólkunum kemur úr Danmark og Norðurlondum, og týsk ferðafólk eru á 3. plássi. Eisini eru nógv ferðafólk úr Bretlandi, USA, Niðurlondum, Fraklandi og Italia. Hetta kann havast í huga, tá ið kort og faldarar verða gjørd.

***ÁTAK: Visit Tórshavn eigur innan stutta tíð at gera eitt kort, ið bæði gevur yvirlit yvir fornminnini, hentleikar, útsýnisstøð, gøtur o.a., og sum sigur nakrar søgur um lívið í bygdini. Hetta eigur at vera gjørt í samstarvi við Tjóðsavnið og Tórshavnar kommunu.***

***ÁTAK: Í sambandi við nýtt bygdakort og gonguleið gjøgnum bygdina verður mælt til, at Visit Tórshavn dagførir og ger fleiri útsýnispostar við beinkjum, skeltum v.m.***

1. AT SIGA TÆR GÓÐU SØGURNAR OG VEITA KUNNING

# KUNNING Á LEITIPORTALUM OG Á HEIMASÍÐUM

Ferðafólk í dag vænta at kunna finna alla kunning á netinum, og tað skal ganga skjótt fyri seg. Tí er týdningarmikið, at kunningin er løtt at finna og løtt at skilja.

Snildfonin er ein fastur fylgisveinur hjá teimum flestu í Vesturheiminum. Sum fyrr nevnt, so vóru tað sambært kanning hjá Visit Faroe Islands 67%, ið nýttu sína snildfon ella teldil til at søkja sær vitan um ferðamálið.

Av tí sama eru ferðafólk í dag meira sjálvhjálpin, enn tey hava verið. Tosað verður um "tað tigandi ferðafólkið", ið ikki vitjar sjálvar kunningarstovurnar og onnur kunningarstøð, men nýtir sína snildfon at finna út av øllum sjálvt.

Donsk kanning frá 2016 vísir at umleið 40% av teimum ferðandi, ið eru ímillum 25-34 ár, vilja heldur sjálvi finna svarið tey leita eftir, heldur enn at spyrja á kunningarstovuni.

Sum ferðavinnupolitikkurin hjá Tórshavnar kommunu eisini vísir á, er tað sera týdningarmikið at heimasíðurnar innan ferðavinnuna eru dagførdar og upplýsingarnar rættar.

Tá ið tú leitar eftir Kirkjubø á Google maps og Tripadvisor, eru tað bert múrurin og kirkjan, ið koma fram, og kunningin um tey bæði er lítil. Her vantar m.a. upplatingartíðir. Einki sæst um bygdina sum heild, Roykstovuna og um hvørjir hentleikar eru í bygdini.

Á heimasíðum sum visittorshavn.fo og visitfaroeislands.com er kunningin um Kirkjubø eisini sera ófullfíggjað.

Á heimasíðuni hjá Tjóðsavninum er fitt av kunning um Kirkjubø. Tó er hendan kunningin bert á føroyskum enn.

# LJÓS Á FORNMINNINI

Í vetrarhálvuni er myrkt ein stóran part av samdøgrinum, og tá sæst múrurin sera illa. T.d. koma ferðafólk ofta at eta í Roykstovuni um kvøldið, og tá er sera harmiligt, at múrurin ikki sæst betur.

Ein ljóskastari lýsir á kirkjuna, men annars er sera myrkt við hini forminnini og á gøtunum, ið leiða til tey.

Eisini kann hugsast, at fólk kunnu koma illa fyri, um tey ganga í myrkri, og hetta er ikki nøktandi, tá ið talan er um nøkur av landsins mest vitjaðu fornminnum.



***ÁTAK: Visit Tórshavn eigur at dagføra og økja um talgildu kunningina, bæði á leitiportalum og á egnari heimasíðu. Harafturat eigur Visit Tórshavn at ráða øðrum ferðavinnuveitarum til at hava dagførdar heimasíður við røttum upplýsingum um Kirkjubø.***

***ÁTAK: Mælt verður til, at fakkøn fólk kanna møguleikarnar fyri at upplýsa múrin, so hann sæst betur um kvøldið, og at syrgja fyri, at fleiri smá gøtuljós verða sett upp við fornminnini. Tað er týdningarmikið at bygdarfólkini eisini verða hoyrd í málinum.***

1. AT SIGA TÆR GÓÐU SØGURNAR OG VEITA KUNNING

# SKELTING

Tey fáu kunningarskelti, ið eru í bygdini, treingja øll til at dagførast. Partvíst tí onkur av teimum ikki hava rættar upplýsingar, men eisini tí tey eru gomul og slitin.

Fleiri fornminni verða sum er ikki víst á við skelting, t.d. Líkhús, Kyrjasteinur og Sverrishola.

Tjóðsavnið arbeiðir í løtuni við at dagføra skeltið viðv. umvælingini av múrinum og dagføring av skeltinum í kirkjuni. Eisini verður gjørt eitt skelti til Líkhús, og hetta arbeiðið væntast liðugt innan stutta tíð.

Sum fyrr nevnt er neyðugt at upplýsa fólk um, hvar tey kunnu og ikki kunnu ganga, so at tey ikki traðka upp um stik og ganga á privatum øki.

Skelting ella "Nudging" kann vera ein stór hjálp til at leiða ferðafólkini har ið vit vilja, at tey skulu fara. Eisini skapar hetta meira virði fyri ferðafólkini, tí tey fáa meira burturúr vitjanini.

## NUDGING

Eitt hugtak, ið verður nógv brúkt innanfyri kunning, er "Nudging". Tað snýr seg um at fáa fólk at broyta atburð, uttan at tey vita av tí sjálvi – eitt slag av øvutari sálarfrøði.

Í staðin fyri at seta forboð og siga fólki, hvat tey ikki skulu gera, skulu tey hjálpast til at gera tað rætta. Tað kann t.d. gerast við at hava eina ruskspann, ið ger eitt stuttligt ljóð hvørja ferð tú koyrir okkurt í hana, ella við at tekna fótafet á gøtuna, ið vísa fólki hvønn veg tey skulu fara, í staðin fyri at nýta skelti.



***ÁTAK: Mælt verður til at Visit Tórshavn í samstarvi við Tjóðsavnið og Tórshavnar kommunu framleiðir skelti ella veitir annað slag av kunning um hvussu tú ferðast í bygdini. Hetta skal gerast í tráð við tilmælið um skelting í Ferðavinnupolitikkinum hjá Tórshavnar kommunu.***

2. AT BØTA UM VINNU- OG INNTØKUMØGULEIKARNAR

# VITJANIR Í KIRKJUBØ

Í Kirkjubø vitja nógv fólk, bæði føroyingar og ferðafólk.

Meginparturin av útlendsku ferðafólkunum, ið koma til Føroya, vitjar í Kirkjubø. Nøkur koma í bussi við føroyskum ferðasmiðum, sum t.d. Smyril Line, HK bussum, Toru Tourist o.ø.

Nakrir av hesum túrum eru fastir túrar, ið verða gjørdir eina ferð um vikuna í summarmánaðunum. Seinnu árini hava umleið 40-50 ferðamannaskip vitjað í Føroyum hvørt ár, og tá eru eisini nógvir gestir ið koma til Kirkjubø við føroyskum ferðabussum.

Eisini eru útlendskir ferðasmiðir, ið koma við teirra egnu bussum og førarum. Hetta er teir sokallaðu "cruisararnir", ið koma við Norrønu í april-mai og aftur frá august-oktober. Tey koma mánamorgun og fara aftur av landinum nakrar tímar seinni.

Fleiri eru tey, ið fara til gongu eftir varðagøtuni og taka ofta býbussin annan vegin, og so eru eisini tey, ið koma við egnum bili ella við ferðaleiðara. Hartil koma sera nógvir "mobile homes".

Felags fyri tey allarflestu er, at tey vitja í kirkjuni, múrinum og Roykstovuni.

# KVEIKINGARSKEIÐ OG FØRLEIKAMENNING

Sum støðan er nú, er mestsum bert tann eina familjan, ið hevur vinnuvirksemi innan ferðavinnu, og tað eru tey Heima á Garði. Í fleiri áratíggjur hava tey, ið varða av festinum, tikið ímóti døgurðagestum, og eru tað nú nógv ferðafólk og føroyingar, ið bíleggja Roykstovuna til privatar veitslur. Her verður borðreitt m.a. við føroyskum lambskjøti, sum bóndahjúnini sjálvi framleiða.

Nógvir aðrir møguleikar eru tó at reka ferðavinnu í Kirkjubø. Til dømis kunnu gerast túrar við ferðaleiðara, fiskitúrar, bindiverkstovur, hava ból og bita ella heimablídni. Eisini ber til at gera ymiskt handverk, ið kann seljast til ferðafólk ella at skipa fyri tiltøkum, har ið ferðafólk t.d. kunnu luttaka í gerandislívinum í Kirkjubø, t.d. í sambandi við seyðahald.

Hetta kann skapa fleiri inntøkur til bygdina og samstundis gera bygdina meira livandi.

Fleiri viðurskifti eru at taka støðu til, tá ið ein skal byrja vinnuvirksemi, sum t.d. reglugerðir, umsóknir, skattaviðurskifti, prísáseting, marknaðarføring o.a.. Hetta kann kanska halda onkrum aftur, sum hevur hug at byrja vinnuvirksemi.

Fleiri ferðavinnusmiðir hava gjørt vart við at tað manglar ein kaffistova í bygdini, so fólk kundu keypt sær okkurt til matna og havt onkran at vent sær til. Av tí at flestu bygdarfólkini arbeiða aðrastaðni, er bygdin rættiliga friðarlig í arbeiðstíð. Tað vil siga, at ein ferðandi kann vitja bygdina uttan at møta nøkrum, ið tey kunnu spyrja um eitthvørt. Hetta er sera óheppið fyri ferðafólk, og hetta kann seta ein neiligan dám á vitjanina, sí brotið "Dagsins ferðafólk".

Við kveikingar tiltøkum ber til at kanna um bygdafólk o.o. hava áhuga fyri at reka ferðavinnu í Kirkjubø, t.d. kaffistovu ella annað virksemi.



***ÁTAK: Visit Tórshavn eigur at gera eina lýsing av, hvørji ferðavinnurekandi koma til Kirkjubøar, nær tey koma og hvussu tey bera seg at. Hetta er hent vitan hjá nýggjum vinnurekandi og ferðavinnuni sum heild.***

***ÁTAK: Visit Tórshavn og Hugskotið eiga at skipa fyri førleikamennandi tiltøkum, so at fólk í Kirkjubø, um tey hava hug, kunnu fáa hjálp til at byrja sítt virksemi.***



2. AT BØTA UM VINNU- OG INNTØKUMØGULEIKARNAR

# BRANDING

Branding er ein sera týdningarmikil partur, tá ið tú hevur við alt vinnuvirksemi at gera, og ferðavinnan er einki undantak. Eitt gott brand gevur tær ein fyrimun í tí stóru kappingini innan ferðamál.

Eitt brand er eitt lyfti til gestin um, hvat hann kann vænta sær. Tað sigur nakað um góðskuna, tænastuna og kostnaðin. Tað er nakað, ið tekur støði í hvørjum málbólki, tú velur at venda tær til.

Kirkjubøur er ein eyðkend bygd við ríkari mentan. Hetta er nakað, ið eigur at koma til sjóndar í marknaðarføringini av bygdini.

Um ein hugsar sær til, at fleiri av íbúgvunum í Kirkjubø fara at reka ferðavinnu í framtíðini, ella selja vørur, so kann eitt brand nýtast sum felagsnevnari fyri allar tænastur og vørur, ið koma úr Kirkjubø, og soleiðis kann hetta brandið vera við til at skapa eitt samstarv millum tey vinnurekandi.

# GJALD FRÁ FERÐAFÓLKI

Ofta hevur verið prátað um, at ferðafólk ongan pening leggja eftir sær í Kirkjubø.

Nakrir av ferðasmiðunum gera avtalu við bóndahjúnini um at vísa runt og gera kaffi og køkur, og onnur hava sín egna ferðaleiðara, ið vísir runt. Nógv eru, ið ikki leggja nakran pening eftir sær, tí at har er ikki innkrevjing av nøkrum atgongugjaldi, men bert bússur í kirkjuni og Roykstovuni, ið ein kann leggja pening í, um einum lystir.

Ein møguleiki er, at tað verður skipað fyri túri við ferðaleiðara nakrar ferðir um dagin, og at fólk so gjalda fyri hetta.

Ein partur av peninginum kundi t.d. verið nýttur til viðlíkhald av fornminnunum, økinum og gransking av fornminnum.

***ÁTAK: Í sambandi við at eitt brand skal gerast fyri Tórshavn, eigur Visit Tórshavn eisini at finna útav, hvørji sereyðkenni Kirkjubøur hevur, og hvussu tey kunnu nýtast sum amboð til at skapa eitt brand og marknaðarføra bygdina.***

***ÁTAK: Mælt verður til, at tey, ið varða av festinum saman við Tjóðsavninum og Visit Tórshavn, kanna hvussu gjald kann takast fyri at vitja fornminnini.***

3. AT SKIPA FERÐSLUNA BETUR

# FERÐSLAN Á LANDSVEGNUM

Fólk í Kirkjubø siga, at ferðslan er munandi økt seinastu árini. Tað kemur fyri, at ferðslutøppur kemur í, tá ið fleiri stór akfør koma ísenn, og ofta hevur verið nær við, at bussar eru farnir útav.

Kanningar vísa at ein bussur slítir vegin 40.000 ferðir verri enn ein vanligur persónbilur.

Tey víkiplássini, ið bóndin upprunaliga gjørdi til arbeiðsbrúk, eru ikki hóskandi til ta mongd av ferðslu, sum er har í dag. Tað hendir fleiri ferðir hvørt summar, at bilar fara í veitina, og bóndin má koma við traktorinum at hjálpa teimum uppaftur.

Ein annar trupulleiki er, at ferðafólk parkera á víkiplássunum, og hetta er til stóran ampa fyri ferðsluna.

Smyril Line ger túrar, og her hava tey sjálvi samskipað tað soleiðis, at allir bussarnir ikki koma í senn, og hetta ger, at ferðslan verður tarnað minst møguligt. Fløskuhálsar koma serliga, tá ið útlendskir bussar við útlendskum førarum koma til landið við Norrønu um várið og um heystið. Tá kemur tað fyri, at tað koma 6-8 bussar í senn. Hetta er vegurin ikki gjørdur til, og bussførararnir duga sum heild ikki nóg væl at geva pláss fyri aðrari ferðslu.

Tørvur er á, at ferðslan verður samskipað, tá ið nógv stór akfør koma í senn. Hetta kann t.d. gerast bæði við at seta seg í samband við teir ferðavinnusmiðir, ið senda bussar til bygdina, men eisini við skeltum ella ferðsluljósum.

Tað hevur verið upp á tal at gjørt eina gongugøtu niðri við sjóvarmálan millum Gomlurætt og Kirkjubø. Hetta kundi gjørt tað gjørligt hjá ferðasmiðum og øðrum at parkera á Gomlurætt og gingið tað síðsta pettið til Kirkjubø, og kundi tí hjálpt upp á ta nógvu ferðsluna.

Sambært starvsfólki á deildini fyri infrakervi hjá Landsverk, er peningur ikki játtaður til at breiðka hvørki víkiplássini ella vegin í Kirkjubø.

Tó er vert at nevna, at í samferðsluætlanini frá 2012 var Kirkjubøarvegurin nevndur og mælt varð til at seta 12 mió. kr. av til at breiðka og dagføra vegin.



***ÁTAK: Mælt verður til, at Tórshavnar kommuna heitir á myndugleikarnar um at raðfesta dagføring av Kirkjubøarvegnum.***

***ÁTAK: Inntil vegurin er dagførdur verður mælt til at Visit Tórshavn setir seg í samband við ferðavinnusmiðir um at samskipa bussferðsluna betri.***

3. AT SKIPA FERÐSLUNA BETUR

# KEIØKIÐ OG PARKERING

Parkeringsøkið við keiina er óskipað. Eingir parkeringsbásar eru merktir á økinum. Hetta skapar fleiri ferðslutrupulleikar, men eisini er økið ikki nakað, ið prýðir um tað annars so vøkru bygdina.

Ferðavinnusmiðir hava gjørt vart við, at kampingvognar og bilar standa fyri, so at bussarnir ikki fáa vent.

Harafturat eru fleiri fólk í kampingvognum, ið gista, hóast eitt skelti er sett upp um, at kamping ikki er loyvd. Hetta hevur við sær, at tey kampingøki, ið eru kring landið, missa inntøkur og at tað almenna vesið á farstøðini verður nýtt til kampingbrúk, og tí slítist og dálkast meir enn ætlað.

Hóast fólk úr bygdini, Visit Tórshavn o.a. hava gjørt kampistarnar varugar við, at tað ikki er loyvi at gista, so eru ikki øll, ið geva hesum ans.

Smyril Line er væl ávegis við einum faldara, ið skal leggjast í rútarnar á øllum kampingvognum og búvognum, ið koma við Norrønu. Her skal vegleiðast um, hvussu ein eigur at bera seg at viðvíkjandi kamping í Føroyum. Hetta verður gjørt í samstarvi við Visit Tórshavn og Visit Faroe Islands.

Nakrir ferðasmiðir eru sum nýta bátadráttin í Kirkjubø. Bátadrátturin er ov stuttur, so tá ið tað er fjøra kemur ofta fyri, at bátar ikki kunnu flotast. Hetta skapar trupulleikar fyri ferðasmiðir, sum vilja gera fiskitúrar ella bátatúrar úr Kirkjubø og runt Hestoynna ella Koltur.

## BÝBUSSURIN

Busssambandið við býbussinum ger tað sera lætt hjá ferðafólki at koma til gongu annan vegin og taka bussin hin vegin, og eru tað fleiri ferðafólk, ið nýta hendan hættin.

Hetta er eisini óivað nakað, ið er við til at minka um ferðsluna í Kirkjubø. Men hóast hetta er ein sera góð tænasta til ferðafólk at veita ókeypis busssamband, er trupulleikin tann, at hetta er í kapping við vinnurekandi innan ferðavinnuna. Eisini er trýstið av ferðafólki stórt um summarið, og tá ið stór ferðamannaskip eru á vitjan kemur fyri, at pláss er ikki fyri borgaranum.

Ein gjaldsskipan kundi givið nakrar inntøkur, ið t.d. kundu verið nýttar til at økt talið av ferðum. Uttanlands síggja vit at fleiri býir hava okkurt slag av “City Card”. Við kortinum fært tú atgongd til ymsar tænastur, m.a. býarbussar, søvn o.a. og ger hetta vitjanina hjá teimum ferðandi lættari.

Ferðaætlanin er í dag bert á føroyskum, og steðgistøðini eru nevnd sum staðarnøvn, ið ferðafólkini ikki kenna til. Tað ger tað trupult hjá ferðafólki at ferðast við bussinum.

Farstøðin er sum nú er bert opin, so leingi bussurin koyrir. Fólk í Kirkjubø hava gjørt vart við, at hetta er ein trupulleiki, tá ið ferðafólk vitja bygdina uttanfyri hesar tíðir. Tá sleppa tey vitjandi ikki at nýta tað almenna vesið á Farstøðini, ið er einasta almenna vesi í bygdini.

Tekniska deild er í gongd við eina nýggja royndarferðaætlan við býbussinum frá 1. apríl 2019, har býbussurin koyrir fýra túrar leygardag og tríggjar túrar sunnudag. Hetta er ein roynd, ið verður gjørd og síðani eftirmett.



***ÁTAK: Mælt verður til, at Tórshavnar kommuna skipar og fríðkar økið á keiini og ger reglur fyri parkering. Herundir eisini fyri búvognar og kampingvognar.***
***ÁTAK: Mælt verður til at Tórshavnar havn dagførir bátadráttin.***

***ÁTAK: Mælt verður til, at Tórshavnar kommuna finnur eina skipan, har ferðafólkið skal gjalda fyri at nýta bussin. Harafturat verður mælt til at gera eina betur skilliga ferðaætlan fyri ferðafólk, og at finna ein loysn, ið gevur ferðafólki atgongd til Farstøðina alt samdøgrið.***





4. AT VERJA FORNMINNINI OG BØTA UM ØKINI RUNDANUM

# FORNMINNINI

Verkætlanin við at verja múrin hevur staðið á í seks ár og eftir ætlan skal hetta vera liðugt á sumri í 2020. Arbeiðið, sum verður gjørt við Líkhús, er ikki liðugt og støða er ikki tikin til nær takið kann takast av.

Tjóðsavnið arbeiðir eftir varðveitingarætlanini sum varð stungin út í kortið í álitinum frá 2008, og sum landsstýriskvinnan við mentamálum góðkendi í januar 2010

Sum kunnugt er lendið í Kirkjubø minkað nógv gjøgnum ár og dag. Søgnin sigur, at lendið millum land og hólmin skolaði burtur í ógvusligu ódnini í 1602.

Brimið hevur í øldir máað av bakkanum og hetta er ein stór hóttan fyri fornminnini. Tað mesta av Líkhúsi er longu skolað burtur.

Mentamálaráðið játtaði 1 mió. kr. av fíggjarlógini í 2018 til projektering av bakkaverjuni og brimgarðinum. Hesin peningurin er nú fluttur til 2019 og arbeiðið fer eftir ætlan í gongd í 2019. Tó er peningurin ikki settur av á fíggjarlógini til at gera verjuna.

# GØTUR TIL FORNMINNI OG ÁBØTUR

Tað er eingin gøta rundan um múrin, og her er ofta vátt at ganga. Hetta er ikki væl egnað til fólk, ið eru illa gongd og fólk í koyristóli. Eisini liggur ofta ein hylur við inngongdina og ein klettur, so at fólk í koyristóli hava trupult við at koma inn í múrin.

Á Tripadvisor verður nevnt, at gøturnar eru hálar, og tey mæla tí til, at ein er væl skøddur.

Eingin gøta er heldur út til Líkhús, ið er eitt fornminni, ið ofta verður gloymt, hóast tað er sera áhugavert. Lendið her er sera vátt og illgongt.

Gøtan yvir til kirkjuna er ikki egnað til illa gongd og tey í koyristóli. Harafturat verður skervur drigin inn í kirkjuna av teimum nógvu ferðafólkunum, ið vitja.

Viðvíkjandi at fáa fólk í koyristóli inn í kirkjuna, ber til at søkja kirkjuráðið um loyvi at seta eina lift upp. Hetta skal eisini góðkennast av Tjóðsavninum.

## VIÐLÍKAHALD AV ØKJUM RUNDAN UM FORNMINNI

Tað slítur upp á vegir, gøtur og bygningar, at so nógv vitjandi eru. Tey ið varða av festinum, taka sær av og bera kostnaðin av viðlíkahaldinum á økinum rundan um fornminnini. Tó hevur Tjóðsavnið ábyrgdina av viðlíkahaldi av sjálvum múrinum.

Økið hevur altíð verið opið fyri almenninginum, og verður marknaðarført sum eitt alment ferðamál, men sum fyrr nevnt verður einki atgongugjald kravt.

*Sí partin "at bøta um vinnu- og inntøkumøguleikar – Gjald frá ferðafólki"*

***ÁTAK:** Mælt verður til, at arbeiðsbólkurin, ið Mentamálaráðið hevur sett til bakka- og brimverjuna, – tryggjar at hesi verða gjørd sum skjótast, fyri at fleiri virðismikil fornminni ikki skola burtur.*

***ÁTAK:** Mælt verður til, at gøtur vera gjørdar til fornminnini. Hesar gøtur eiga at vera gjørdar við atliti til fólk, ið bera brek.*

5. AT FREMJA ÁBØTUR Á VARÐAGØTUNA TIL HAVNAR

# VARÐAGØTAN TIL HAVNAR

Varðagøtan millum Kirkjubø og Havnina er óivað mest nýtta varðagøtan í landinum, og tað sæst. Ymsastaðni er gøtan illa slitin. Nógvir nýggir varðar eru gjørdir, so teir standa lið um lið. Hetta fylgir ikki tí føroyska siðinum um varðar.

Gøtan er illa farin tað fyrsta pettið úr Havnardali og tað seinasta strekkið oman til Kirkjubø.

Bóndin á garðinum, Kirkjubøhagi fyri Handan, hevur gjørt vart við, at fólk hava trupult við at finna útav, hvar gøtan byrjar, og tí klíva tey upp um stik og ganga har tey ikki skulu. Tað sama er galdandi í Kirkjubø, har bygdarfólk hava ampa av at vísa ferðafólkum, hvar gøtan byrjar.

Fleiri eru eisini, ið byrja við vøllin hjá Argja Bóltfelag og ganga tí gjøgnum bøin, har tey eru til ampa fyri seyðin. Seyðurin verður óróligur, tá ið fólk koma í stórum bólkum og annars ganga har, ið tey ikki plaga. Hetta kann ávirka soleiðis, at ærnar kasta burtur.

Um tað eru skelti og greiðar ábendingar um, hvar ein skal ganga, fáast fólk at ganga sama veg og so venur seyðurin seg við hetta og verður tí ikki óróligur.

Eitt annað, ið ávirkar seyðin, eru hundar; eisini tá ið teir eru í bandi. Tað er ólógligt at hava hund við í hagan, men hóast tað, so hendir hetta ofta. Tó kann tað ikki hugsast, at tað eru ferðafólk, ið ganga við hundi, men heldur føroyingar.

Eitt kunningarskelti um gongutúrin stendur uppi við bussskýlið á Velbastaðarvegnum, men tað eru óivað fleiri, ið ikki síggja hetta skelti, um tey parkera niðri við ánna. Tí átti eisini eitt skelti at staðið á parkeringsøkinum niðri við ánna.

Fleiri áhugaverd støð eru á leiðini til Kirkjubøar. Millum annað talarastólurin við Reynsmúlalág, har nógvir fólkafundir hava verið. Men ringt er hjá fólki at finna hesa støðini, uttan at tey hava onkran staðkendan við sær.

Ofta hendir tað, at fólk ganga skeivt, tá ið tey skulu ganga oman í bygdina í Kirkjubø. Í staðin fyri at fara oman eftir gøtuni, halda tey vegin fram omanfyri stikið, og mugu tí traðka upp um stik yviri í Geilini og hjálpast innum.

Fólk, ið koma til gongu eftir varðagøtuni, enda ofta niðri á landsvegnum, og tað tarnar ferðsluni, tí vegurin er so smalur. Samstundis kann tað gerast vandamikið, um fólk og stórir bussar eru á vegnum í senn.

Teir ovaru bygdarvegirnir eru knýttir saman við sniðgøtum. Tó manglar gøta á strekkinum frá har varðagøtan endar og á veg yvir í Geilina.

Arbeiðið við at gera hesa gøtuna er bílagt av Býarskipanardeildini hjá Tórshavnar kommunu, og skuldi verið klárt áðrenn summarið 2019.

Í sambandi við *Closed For Maintenance* verkætlanina hjá Visit Faroe Islands, er arbeiðið á varðagøtuna gjørt. Varðarnir eru fríðkaðir, prestar settir niður o.a. Eisini eru gonguskelti bíløgd og verða hesi sett upp í næstum.

Viðvíkjandi skelting er vert at nevna, at Visit Faroe Islands hevur gjørt ein skeltisverkætlan, og hava tey átikið sær samskipandi og vegleiðandi leiklutin at menna felags skeltingarleist fyri alt landið. Ein felags skeltingarleistur gevur greiða og einsháttaða kunning, sum tann ferðandi lættliga kennir aftur.




***ÁTAK: Mælt verður til, at Tórshavnar kommuna í samstarvi við Tórshavnar Býarsavn, Búnaðarstovuna, Náttúrurfriðingarmyndugleikar, festibøndurnar, Visit Tórshavn og Visit Faroe Islands halda fram við arbeiðinum við at bøta um varðagøtuna til Havnar. Eisini verður mælt til at eyðmerkja tey vitjanarverdu støðini á leiðini. Øll eyðmerking í haganum skal gerast við størsta varsemi.***



6. AT FÁA TIL VEGA VITAN UM FERÐAFÓLKINI

# VITAN UM FERÐAFÓLKINI

Vitanin um hvørji ferðafólk vitja í Kirkjubø er lítil og eingin. Ferðafólkatalið økist og hugsast kann, at slagið av ferðafólkum broytist. Fyrr hava tað mest verið norðurlendingar, ið hava vitjað landið, men tann økta marknaðarføringin hevur gjørt Føroyar kendar um allan heimin. Fólk koma nú úr øllum heraðshornum og hava ymiskar grundir til at koma higar.

Tað er týdningarmikið, at vit fáa vitan um tey fólk, ið vitja landið, so at vit betur kunnu veita tær tænastur, ið hóskar til tey.

## TELJING AV AKFØRUM OG GONGUFÓLKI

Eingi hagtøl finnast um, hvussu nógv fólk hava vitjað í Kirkjubø millum ár og dag.

Aðrastaðni í Føroyum eru ferðsluteljarar settir upp yvir nøkur ár, og út frá teimum tølunum ber til at síggja nakrar ábendingar um vøksturin av ferðafólkatalinum.

*ÁTAK: Mælt verður til, at Landsverk og Tórshavnar kommuna syrgja fyri, at ein ferðsluteljari verður settur upp í Kirkjubø, ið dugir at skyna millum bussar og persónbilar. Hetta kann gerast yvir nøkur ár, so at ein kann samanbera tølini. Harafturat verður mælt til, at Tórshavnar kommuna setir ein teljara á portrið, antin í Havndardali ella í Kirkjubø, ið kann telja tey fólkini, ið er til gongu.*

*ÁTAK: Visit Tórshavn eigur at lýsa ferðafólkini við hagtølum, segmenteringskanningum og innsavna vitan um ferðafólkini, sum longu finst í Føroyum hjá ferðasmiðum, busseigarum, ferðaleiðarum og teimum Heima á Garði. Hetta skal gerast við produktmenning og marknaðarføring fyri eyga.*

TÓRSHAVNAR KOMMUNA
OG VISIT TÓRSHAVN
MAI 2019